**SEMJA**

**MILLUM**

**FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG**
**OG**
**STARVSMANNAFELAGIÐ**

Omanfyri nevndu partar eru í dag samdir um at leingja sáttmálan fyri Føroya Tele til 1. januar 2021.

Semjan byggir á ein karm á 3,26 % fyrsta árið, og 2,56 % annað árið.

1. Lønin hækkar í sáttmálaskeiðinum soleiðis:
   Hin 1. januar 2019 1,80 %
   Hin 1. januar 2020 1,65 %

2. Grein 27, stk. 2 verður strikað, og ístaðin verður sett inn henda orðing:

   *"Starvsfólk á Føroya Tele hava keypt 5 frídagar um árið, sum verða innvunnir á sama hátt sum frítíð eftir frítíðarlógini. Vunnir verða 0,42 serstakir frídagar við løn fyri hvønn mánað í starvi (5 daga vika). Um starvsfólkið ikki ynskir at keypa hesar frídagar, verða teir útgoldnir við ½ % av árslønini fyri hvønn dagin. Hjá starvsfólkum, ið arbeiða minni enn fulla tíð, verða frídagarnir roknaðir lutvíst í mun til arbeiðstíðina.*

   *Starvsfólk, ið arbeiða minni enn 3 mánaðir um árið (umroknað til fulla tíð), hava ikki rætt til at halda frídagarnar.*

   *Løntakarin og arbeiðsgevarin avtala, nær frídagarnir verða hildnir. Eftir avtalu kunnu frídagarnir flytast til árið eftir."*

   Øll starvsfólk, sum eru fevnd av hesi semjuni, fáa góðskriva ein feriudag pr. 1. januar 2019. Hesin frídagur skal ikki liggja ein leygardag.

3. Grein 30 verður orðað soleiðis:

   *"§ 30. Viðbøtur.*

   *Stk. 1. Tá stórur eftirspurningur er eftir starvsfólkum við serligum kunnleika, kann ein viðbót verða latin afturat grundlønini.*

   *Stk. 2. Viðbøtur verða latnar í stigum. Fyrsta viðbótartrin er kr. 500 um mánaðin og kr. 500 skulu vera millum fylgjandi trin.*

   *Stk. 3. Allar viðbøtur eru eftirlønargevandi."*

   Grein 31 verður strikað.

   Broytingin í grein 30 verður galdandi fyri viðbøtur, sum verða latnar eftir 1. januar 2019.

Ískoytir, sum í dag eru latin, halda fram óbroytt og verða eftirlønargevandi.

4. Grein 31, stk. 2 verður til stk. 4 í grein 30, og orðingin verður broytt til: "*3 mannanevndin verður kunnað, tá viðbøtur hjá limum Starvsmannafelagsins verða afturtiknar*".

   Fylgjandi greinar broyta nummar samsvarandi.

5. 1. januar 2019 verða endastig í bólki B og C broytt soleiðis, at ávísir bólkar fáa eitt eykað stig. Endastigið í bólki B hækkar frá stig 17 til stig 18. Eitt endastig verður lagt afturat hjá teimum í bólki C, sum liggja á stig 12-20. Bólkur C, stig 12-20, verður sostatt broyttur til stig 12-21.

   1. januar 2020 hækka endastig í bólki B og C enn einaferð, soleiðis at ávísir bólkar fáa eitt eykað stig. Endastigið í bólki B hækkar frá stig 18 til stig 19. Eitt endastig verður lagt afturat hjá teimum í bólki C, sum liggja á stig 12-21. Bólkur C, stig 12-21, verður sostatt broyttur til stig 12-22.

   Broytingarnar í endastigunum í lønartalvuni í 2019 og í 2020 eru ikki galdandi fyri krambafólk í bólki B, og økis- og deildarleiðarar í bólki C.

   Umframt omanfyri nevndu broyting í stigunum fyri ávísar starvsfólkabólkar í bólki B og C, verða øll starvsfólk, sum liggja undir stig 28, lyft eitt lønarstig afturat í 2020. Hetta er tó ikki galdandi fyri bólk A, krambafólk, økisleiðarar og deildarleiðarar.

   Sáttmálin og lønartalvan verða dagførd sambært hesum broytingum.

6. Í sáttmálanum fyri Føroya Tele § 35 verður "1. januar 2017" broytt til "1. januar 2019" og "1. januar 2019" broytt til "1. januar 2021".

**Tórshavn, 20. desember 2018**

**Fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag**

Kristoffur Laksá

Marita Rasmussen

**Fyri Starvsmannafelagið**

Súni Selfoss/Anna Johannesen

Jóngerð Símonsen

Bjørg Jacobsen

Jónleif Jørgensen